## Sleppur ikki at súkkla

Danski súkklarin, Michael Rasmussen, sum var tveittur úr Tour de France í 2007 – tá bert fáir dagar vóru eftir og hann var í gulu troyggjuni – tí hann skuldi havt sloppið sær undan dopingeftirliti, sleppur ikki við til sponsku kappingina, Vuelta a España, tí tilmeldingin ikki skal vera í lagi. Sjálvur hevur Michael Rasmussen illgruna um, at tað er altjóða súkklisambandið, UCI, sum forðar honum í at fáa gongd á aftur súkklingina.



## Dopaðir sprintarar

Fimm sprintararnir frá Jamaica, sum fullu í dopingroyndum fyri at hava tikið stimbrandi evnið, methylxanthin, eru koyrdir úr HM-hópinum hjá Jamaica, hóast teir upprunaliga blivu fríkendir, orsakað av einum formligum feili. Tí kundu Yohan Blake, Marvin Andersson, Sheri-Ann Brooks, Allodin Fothergill og Lansford Spence saktans kappast, nú HM er í Berlin, men altjóða sambandið fyri frælsan ítrótt, IAAF, hevur rátt Jamaica frá at latið teir kappast.

# Síðsta útkall

**Tey, ið renna aftan á HB, mugu helst seta sínar vónir til, at oddaliðið skal snáva enn eina ferð í Runavík. Dysturnir fækka og hetta er síðsta útkall, skulu hini hava kjansin at fáa HB aftur**

FÓTBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

HB hevur bara tapt tvær ferðir í ár. Seinna ferðin var mikukvøldið í Gundadali, tá EB/Streymur vitjaði, og fyrra ferðin var, tá HB í triðja umfari var í Runavík og vitjaði NSÍ.

Sum er, eru havnarmenninir 10 stig framman fyri NSÍ og Víking á stigatalvuni, samstundis sum bara sjey umfør eru eftir. Sostatt líkist dysturin í Runavík sunnudagin síðsta útkalli, um nøkur vón skal vera fyri, at HB verður tikið aftur.

Dysturin verður spældur tíðliga sunnudagin, so Bogi Løkin kann fáa hann við, áðrenn hann seinni um dagin fer niður í lestrarørindum. Annars hevur NSÍ ikki nógvar skaðar ella annað at dragast við. Jóhan Troest Davidsen tó ikki klárur enn, eftir at hann beklaði ímóti KÍ. Hinvegin er toppskjúttin hjá NSÍ, Károly Potemkin, aftur tøkur, eftir at hann hevði karantenu 07 Vestur-dystin.

Somuleiðis fær HB eisini sín toppskjútta, Andrew av Fløtum, aftur frá karantenu, og Rasmus Nolsøe, sum hevur verið heima hesa vikuna, tekur henda dystin aftrat, áðrenn hann fer niðuraftur.

Hinvegin er Vagnur Mohr Mortensen enn ikki klárur, eftir at hann hevur verið skaddur síðani dystin ímóti 07 Vestur.



**Andrew av Fløtum er við aftur, nú HB vitjar NSÍ í Runavík. Hann sat uttanfyri við karantenu, tá HB mikukvøldið tapti fyri fyrstu ferð síðani triðja umfar. Tað var júst ímóti NSÍ í Runavík…**

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

# Vágamenn vitja Víking

**07 Vestur vísti styrki, tá tað mikukvøldið eydnaðist at berja seg upp á javnt ímóti NSÍ, samstundis sum Víkingur í Klaksvík mátti lúta fyri KÍ**

FÓTBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Sæð úr sjónarhorninum hjá vágamonnum, er ynskiúrtøkan hetta umfarið, at 07 Vestur vinnur á Víkingi í Gøtu í annaðkvøld, og at dysturin sunnudagin millum B36 og KÍ endar við javnleiki. Hendir tað, hevur 07 Vestur otað seg ein bita longur upp.

Hinvegin er hetta neyvan lættasta løtan at vitja Víking, sum júst hevur tapt tveir dystir og av øllum alvi vil reisa seg. Júst tað kann tó gera, at hesin dysturin millum topp og botn kann gerast serastakliga lívligur, tí bæði hava nógv at spæla fyri.

Undan dystinum í morgin gera tveir aktuellir skaðar, at liðið hjá Víkingi møguliga ikki verður fullmannað. Hans Jørgen Djurhuus fór skaddur út eftir bara eitt korter ímóti KÍ, og 10 minuttir inn í seinna hálvleik fekk Hanus Jacobsen eisini skaða. Báðir eru ivasamir til dystin ímóti 07 Vestur, so møguliga verða broytingar á liðnum.

Hinvegin stendur væl til við fólki hjá 07 Vestur, sum hvørki hevur karantenu ella nakran nýligan skaða at dragast við. Einastu, sum ikki eru tøkir, eru Jovan Panic og Hendrik Rubeksen, ið hvørgin hevur spælt, síðani teir báðir blivu skaddir í dystinum ímóti HB.

# Miðju-uppgerð á Argjum

**Bæði AB og ÍF hava riðið lágt fyrr í kappingarárinum, men hava otað seg upp ímóti miðjuni. AB má sigast at hava bjarga sær, meðan ÍF enn hyggur aftur um seg**

FÓTBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tað eru tvey lið, sum hava verið í einum góðum stima í síðstuni, sum hittast á Argjum sunnudagin, tí bæði AB og ÍF hava vunnið fleiri dystir og fingið kærkomin stig síðstu umførini. Og felag fyri tey er eisini, at tey eftir eina trilvandi byrjan hava strítt seg upp í miðjuna á stigatalvuni.

AB hevur staðið seg so mikið væl, at tey flestu eru samd um, at argjamenn mestsum hava tryggjað sær plássið í Vodafonedeildini komandi ár, meðan ÍF eisini eru komnir væl fyri, men enn ikki eru komnir heilt so langt upp frá botnstríðnum sum AB.

Argjamenn eru stórt sæð mannaðir á sama hátt, sum teir hava verið tað síðstu dystirnar. Nikolaj Eriksen, sum hevur verið óheppin við skaðum í ár, er aftur skaddur og ikki klárur enn. Heldur ikki Høgni M. Joensen og Alex Mellemgaard, sum er skorin í knænum, eru tøkir. Hinvegin sat málverjin, Heðin Stenberg, á bonkinum, tá AB vitjaði á Toftum mikukvøldið.

Hjá ÍF er miðverjan aftur fullmannað, nú Høgni Zachariasen hevur meldað seg kláran aftur. Hann fór skaddur út ímóti Víkingi, og Kaj Ennigarð, sum kom inn fyri hann tá, fór seinni í tí dystinum av vølli við skaða, og hann verður helst úti í eina tíð. Andy Olsen fór út við snuddi mikukvøldið, men er helst klárur, meðan Áki Petersen enn er ivasamur.